# Tavan søkir virkisleiðara

## Starvið

umfatar m.a. at:

- leggja dagligu framleiðsluna til rættis
- skipa fyri dagliga innkeypinum av rávørum og pakningi
- samskifta við undirveitarar

Harumframt skal virkisleiðarin, saman við góðskuleiðaranum, síggja til, at góðskuhondbókin verður fylgd.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

## Umsøkjarin

Vit vænta at umsøkjarin:

- er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- hevur royndir innan leiðslu og/ella fiskaframleiðslu

Lønin verður sett eftir nærri avtalu.

## Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast:

**Tavan**
Stílað: Joen Magnus Rasmussen
Postsmoga 29
520 Leirvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 25. november 2008**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Joen Magnus Rasmussen á telefon 443355 ella 212255.

*Tavan í Leirvík er eitt fiskavirki. Á Tavuni starvast umleið 60 fólk.*

# Maritime karrieremuligheder i herning shipping

**Navigatører og Maskinmestre**










**Som led i vor løbende udvidelse af Rederiets tonnage tilbyder herning shipping gode karrieremuligheder i Rederiets DIS-registrerede flåde.**

For yderligere information kontakt venligst herning shipping a.s., Theresavej 1, 7400 Herning, tlf. direkte +45 9626 6671 eller mail crew@herning-shipping.com, www.herning-shipping.com

*herning shipping a.s. driver international rederi- og mæglervirksomhed og disponerer over 40 tankskibe. Rederiet beskæftiger ca. 400 medarbejdere - 350 til søs og omkring 60 i administrationen i Danmark, Frankrig og Singapore. Rederiet har godkendt kvalitetsstyringssystem i henhold til ISO 9001, ISO 14001, ISM, GMP + HACCP samt OHSAS 18001. Alle certifikater er udstedt af Lloyds register Quality Assurance for såvel skibe som administrationen.*

herning shipping

# Sosialráðgevarar til Almannastovuna

Almannastovan søkir eftir sosialráðgevum til Økisdeildina í Klaksvík og í Saltangará.



**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur aðra hóskandi sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera ein mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á.

**Starvið**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at byrgja fyri sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá ið trupulleikar koma í.

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jóan Hendrik S. Samuelsen, deildarleiðara í Klaksvík, á telefon 21 54 87, ella Egil G. Olsen, starvsfólka leiðara, á telefon 21 54 85.

**Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til:**
Almannastovuna Smyrilsveg 20,
Postboks 3096, 110 Tórshavn.
Ella við telduposti til
almannastovan@almannastovan.fo

**Freistin**
Umsóknarfreist er mánadagin 3. des. 2008 kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan:
" Sosialráðgevar til Almannastovu K/S".

KREA

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Hartil skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo